# TILTØK

**Hvítusunnustevnan 2003**
í Ítróttarhøllini á Hálsi í døgunum 6. til 9. juni.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Stórt syngið við kvøld.
Leygarkvøldið kl. 19 Evangel. møti, kl. 22 Youth Arise – ungdómstiltak við ymsari luttøku.
Hvítusunnudag kl. 11 Møti, kl. 18 Evangel. møti. Hvítusunnukvøld kl. 22 Lovsangskonsert við føroyskum solistum og útlendskum tónleikarum – saman við United Voices.
2. Hvítusunnudag kl. 11 Møti og kl. 17 Evangel. møti.
Á møtunum verða nógvir ymsir talarar.
**Barnatiltøk:** Spennandi barnatiltøk verða leygarkvøldið, 1. og 2. hvítusunnukvøld í Rhema. Byrja verður saman í stóru høll. Bøn verður 1 tíma áðrenn kvøldmøtini byrja. Sí annars lýsingar í bløðunum.
Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Vegna Hvítusunnustevnu í høllini á Hálsi, verða eingi møti í Filadelfia.
www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Mikudagin møtast vit í húsbólkum. Samskipari: Mai L. Simonsen, tlf. 315226.
www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími, Áps. kap. 13, 1-20.




# Føroya Koyriskúli

**Stanley Olsen tlf. 21 10 99**

Nýtt teoriskeið byrjar
týsdagin 10. juni kl. 17.30
á Suðuroyarvegi 11, tlf. 21 10 99
Teldupost: stanley@post.olivant.fo

Sosialurin 341800


Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Sverra Kass, »Einaferð Jesus, altíð Jesus«.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Hvítusunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Hera Tróndheim
2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti v/ Birgir Johannesen.

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.ebenezer.fo

**Gudstænastur**
**Mikudagin 4. juni**
*Skopun:* kl. 20 Inga Poulsen Dam

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Mikukvøldið kl. 20 Møti.

**Missiónshúsið Libanon í Sørvági**
Hvítusunnustevnan verður í døgunum 6.-9. juni. Talari á stevnuni verður Peter Tkaczyk. Øll, yngri sum eldri, eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Týsdagin kl. 20 í Glyvra-Hanusars húsi, bibeltime v. Peter O. K. Olofson.

**Thabor, Fuglafjørður**
Møti verður mikukvøldið kl. 20 við Knud Didriksen, forstandara á Grejsdalens Efterskole í Danmark.

**Missiónshúsið, Leirvík**
Hvítusunnu møtir verða í døgunum 7.-9. juni.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari og Leirvíkskórið syngur.
Hvítusunnudag kl. 19 talar Regin Høgnesen, trúboðari og Kórið Effata, Strendur syngur.
2. Hvítusunnudag kl. 19 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari og Glyvra Streingjakór syngur.

**Siloa, Fuglafjørður**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Símun Pætur á Torkilsheyggi talar. Evni: Elias. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Skopun**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 4. juni
Sangur og upplestur.
Heildagstúrur til Elduvíkar.
18. juni er ætlanin at fara ein dagstúr norðureftir. Vit leiga buss við okkum, og fara úr Skopun kl. 10.30. Síðani koyra vit norður til Elduvíkar, har vit eta døgurða í Lonini uml. kl. 1.203. Á veg suður aftur vitja vit útgrevsturin í Kvívík og onnur støð. Kostnaður fyri túrin íroknað ferðing og mat er kr. 250. Neyðugt er at melda seg til túrin í seinasta lagi 15. juni antin í Tilhaldinum ella á tlf. 361990. Tilhaldið fer í summarfrí 1. juli til 1. september.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 2. mai:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum. Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving, dart og onnur spøl. **Tilmelding til túrin mikudagin oman á Skálatrøð tlf. 316491**
*Týsdagin 3. juni:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Flemming og Benny Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát
*Mikudagin 4. juni:*
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14.30 »Vitja fabrikkina hjá Østrøm« í dag handil hjá Valdemar Lutzen á Skálatrøð. Tilmelding.
*Hósdagin 5. juni:*
Grundlógardagur – stongt.
*Fríggjadagin 6. juni:*
kl. 10 Vitja framsýningina Kelduvaði í Müllers Pakkhúsi. Hittast í Müllers pakkhúsi. Tilm. tlf. 316491
kl. 14-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.30, lisið verður í Stóru bók.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**V4-dráttur**
**í drátti nr. 1489**
**31. mai 2003**

**Tølini:** 1 - 2 - 15 - 22 - 39 - 50 - 56 - 62 - 68 - 69 - 75 - 78 - 79 - 81 - 92 - 98

**Tríggir vinnarar**
Snars. nr. 2522002, Hoyvík
Snars. nr. 2528524, Miðvágur
Snars. nr. 2542421, Tórshavn

**Eykavinningur**
Vanl. seðil nr. 340063, Tórshavn

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 22. mai 2003 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at uml. 1.500 $m^2$ verða lagdir aftarat B3-økinum (økið til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt) við Velbastaðvegin.

Broytingin liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá mikudegi 4. juni til og við 25. juni 2003, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.30 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 4. september 2003.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 22. mai 2003 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at A1-sethúsaøkið við Reynsgøtu, matr. nr. 4 bs og 4 cl, millum Reynstún og dagstovnin á Argjum, verður broytt til A3-øki til blandaða bústaða- og miðstaðabygging

Broytingin liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá mikudegi 4. juni til og við 25. juni 2003, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.30 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 4. september 2003.

SNARSKIVAN

## BRÚDLEYP

Leygardagin 5. juli kl. 9.00 giftast í Ebenezer Randi Louisa Fjallsá og Rani Isaksen, bæði úr Tórshavn. Brúdleypið verður hildið á Hotel Føroyum kl. 11.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 315941 ella 212628 í seinasta lagi 20. juni.



# Landbúnaðarskeið í Klaksvík lokið



*Aftasta rað frá vinstru: Mikkjal Joensen, Trøllanes, Símun Petersen, Klaksvík, Símun Gullaksen, Klaksvík, Kristin Poulsen, Klaksvík, Jógvan Joensen, Klaksvík. Mittasta rað frá vinstru: Jóhanna Maria Hansen, Hattarvík, Hans Elias Højgaard, Húsar, Hjørdis Hansen, Norðoyri, Essa Petersen, Norðdepli, Sámal Sørensen, Mikladalur. Fremsta rað frá vinstru: Emma Sigvaldsdóttir Jacobsen, Hattarvík, Oddbjørg Justinussen, Árnafjørður, Hanna í Kongsstovu, Haraldsund, Ingun Samson, Viðareiði. Á myndini vanta: Bjarni Ziska Dahl, Klaksvík og Albert Sjúrðaberg, Klaksvík.*
*(Mynd: Norðlýsið)*



*Jógvan Joensen, Kristin Poulsen, Símun Petersen og Símun Gullaksen gjørdu eina verkætlan um "Framtíðar Seyða- og Neytahald" Teir ynsktu at vera ílatnir okkurt, sum symboliseraði hetta. Tað nærmasta, teir kundu koma, vóru blusur frá Føroya Bjór við veðrinum á*
*(Mynd: Rúna Sivertsen)*



*Tað var Andras Joensen, bóndi í Gerðum, sum kom við hugskotium um at skipa eitt Landbúnaðarskeið í Klaksvík. Her er hann avmyndaður við soninum, Jógvan, sum var ein av næmingunum á fyrsta skeiðinum, og abbasoninum Andras, sum sigur, at hann ætlar sær at verða bóndi, tá hann verður stórur*
*(Mynd: Rúna Sivertsen)*

**Seinasta mikudag fingu 16 næmingar handað "Námsprógv í yrkisskeiði innan landbúnað" í býráðshøllini í Klaksvík. Hetta var fyrsta skeið av sínum slag í Norðoyggjum. Skeiðið varð skipað sum eitt kvøldskúlaskeið. Slík skeið verða eisini hildin á Búnaðardeplinum, men tey eru í vanligari skúlatíð**

PRÓGVHANDAN
*Rúna Sivertsen*

**Klaksvík:** Landbúnaðarskeiðið í Klaksvík er sprottið úr hugskoti hjá Andrasi Joensen, nevndarlimi í Bóndafelag Føroya, sum visti um eitt slíkt skeið á Búnaðardeplinum í Kollafirði.

Hetta segði Eigil Hentze, kvøldskúlaleiðari, í røðu síni, tá 16 næmingar fingu handað námsprógv í býráðshøllini seinasta mikudag.

- Hugskotið varð lagt fyri Jóruna Høgnesen, formann í mentanarnevd býráðsins og Jenny Lydersen úr Mentamálaráðnum. Tá tær báðar sýndu málinum vælvild, lá væl fyri at fara víðari. Vit vilja fegin takka teimum øllum trimum fyri, at skeiðið gjørdist veruleiki, segði hann.

Skeiðið er skipað í lærugreinirnar, búskap, húsdjór, plantur, tøkni, lívfrøði og náttúru. Umframt hesar lærugreinar, skuldu næmingarnir eisini gera eina verkætlan. Tímatalið er 200 tímar; tá er próvtøkutíðin ikki íroknað.

### Óvæntaður heiður

Sum vanligt, fingu tríggir av næmingunum heiðursgávu fyri bestu avrik. Emma Sigvaldsdóttir Jacobsen úr Hattarvík varð best. Hon fekk eitt gávukort uppá 1500 krónur frá Meginfelag Búnaðarmanna. Næst henni varð Hans Elias Højgaard av Húsum. Hann fekk eina vekt frá heilsøluni, Triv. Og nummar trý gjørdist Bjarni Ziska Dahl, sum fekk eitt koppastell frá Kjølbro heilsølu.

Sum nakað nýtt, høvdu næmingarnir gjørt av at heiðra tann næmingin, sum hevði bestu samarbeiðsevni. Henda heiður fekk Jóhanna Maria Hansen úr Hattarvík, sum gjørdist ógvuliga ovfarin og glað.

Hon fekk henda heiður fyri at vera savnandi, stillfør, arbeiðsom og mennandi.

Jóhanna Maria fekk eitt vakurt pennasett frá Norðoya Sparikassa, sum Eyðfinn Reyðberg, stjóri, handaði henni.

Hann segði, at hetta var nakað, sum Norðoya Sparikassi í framtíðini fór at heiðra næmigar fyri, tí samstarvsevni hava størstan týdning, tá til stykkis kemur.

### Fullteknað skeið

Tá fyrireikingarnar til skeiðið byrjaðu, varð sagt, at fingu tey 8 næmingar á listan, skuldi tað latið seg gjørt. Men tað stóð ikki á at fáa fólk, og tá avtornaði, var skeiðið fullteknað við 16 næmingum og nøkrum á bíðilista.

Líkt er til, at at slíkt skeið verður aftur komandi vetur, sigur Eigil Hentze.

Verkfallið gjørdi, at prógvhandanin mátti fara fram í býráðshøllini, men løtan gjørdist ikki minni hugnalig av teirri orsøk.


**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 03.06. | kl. $18^{30}$ | Týsdagin | 03.06. | kl. $22^{45}$ |
| Mikudagin | 04.06. | kl. $18^{30}$ | Mikudagin | 04.06. | kl. $22^{45}$ |
| Hósdagin | 05.06. | kl. $18^{30}$ | Hósdagin | 05.06. | kl. $22^{45}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 03.06. | kl. $20^{15}$ | Mikudagin | 04.06. | kl. $20^{15}$ |
| Hósdagin | 05.06. | kl. $20^{15}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 03.06. | kl. $22^{00}$ | Mikudagin | 04.06. | kl. $22^{00}$ |
| Hósdagin | 05.06. | kl. $22^{00}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 03.06. | kl. $19^{30}$ | Mikudagin | 04.06. | kl. $19^{30}$ |
| Hósdagin | 05.06. | kl. $19^{30}$ | | | |




**Frumsýning Fríggjadagin 06.06.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**